## ÍSB-svimjarar í Berlin

Í hesum døgum eru tveir svimjarar umboðandi ÍSB við í International German Swimming Championship í Berlin. Krista Mørkøre úr Ægi í Klaksvík og Dann Akursmørk, sum svimur fyri felag í Danmark eru bæði ungir svimjarar, sum vit vænta okkum nógv av. Framtíðarmálið er Paralympic í Berlin í 2012. Tey eru bæði við í 8 kappingum í Berlin. Fyrst og fremst eru vónir um, at tey betra um tíðir sínar. Men annað stendur eisini upp á spæl. Fyri at kunna vera við í EM í Reykjavík í oktober mánaði krevst, at tey klára kravtíðirnar til ta kappingina, so eitt høvuðsmál í Berlin er, at hetta eydnast teimum.

## Róðrarárið byrjar

Hóast róðurin ikki telur við í FM-kappingini, so verður stevnan á Strondum roknað sum eitt slag av forpremieru, har bátarnir veruliga kunnu styrkismeta seg. Leygardagin eru soleiðis ikki færri enn 49 manningar meldaðar til kappróðurin, og í góða veðrinum, sum verður sambært forsagnunum er tí líkt til, at stevnugestirnir kunnu fáa ein bæði góðan og spennandi dag.



Víkingur-ÍF 5-0 (2-0):

# Sorl í Sarpugerði

**Víkingur eyðmýkti fullkomuliga ÍF, sum skal royna at reisa seg, tá teir aftur spæla móti Víkingi 2. hvítusunnudag**



**VÍKINGUR-ÍF**
*Jákup Mørk*

- Eg havi spælt fótbólt í 25 ár, og eg má siga, at eg havi ongantíð verið so flovur sum í kvøld. Tað var staðfestingin hjá gøtumanninum Poul Ennigarð, sum í ikki so galnu fótbóltslíkindunum í Sarpugerði var liðformaður á ÍF liðnum.

Útsøgnin hjá Poul Ennigarð var at hoyra í útvarpinum hjá Kringvarpinum, og har var Víkinga liðformaðurin og miðverjin, Niclas Niclasen, sum rímuligt er heilt væl nøgdur við avrikið hjá hansara monnum.

Tað var ikki at undrast á, at Niclas var væl nøgdur. Víkingur spældi ÍF sundur og saman, og soleiðis sum tað myndaðist, so var 5-0 sigurin ikki eitt mál ov stórur.

Longu 2. hvítusunnudag fara somu lið at hittast vølli í landskappingini. Avrikini í gjárkvøldið vístu, at Víkingur er stórfavorittur undan landskappingardystinum, hóast fuglfirðingar tá eiga fyrimun av heimavølli.

Tað sær heilt spennandi út hjá samansetta liðnum, sum seinastu dagarnar hevur víst seg at vera heilt væl fyri. Frá nú av og fram til á Ólavsøku, tá ið Víkingur og EB/Streymur fara at spæla finalu, verða sjey umfør á skránni í landskappingini. Hvussu nógv stig Víkingur fer at vinna í hesum tíðarskeiðnum fer tíðin at vísa, men um hugburður og avrik verða soleiðis, sum tey vóru ímóti ÍF hóskvøldið, so verður ikki stuttligt at vera fyri.

Spælararnir fluttu seg væl og nógv. Bóltførleikin var góður, spæligleðin var stór, sjálvsálitið er støðugt vaksandi, stríðsviljin minti nógv um tann hjá GÍ í góðu gomlu døgunum, og fimm mál vórðu skorað.

Men so eigur at verða lagt aftrat, at mótstsøðan var einki at rópa hurrá fyri. ÍF liðið er í leikligum aldudali. Sjálvsálitið er lítið, persónligu mistøkini vóru mong, og tað snúði seg mest sum bara um at renna aftaná heilt væl uppløgdu heimamonnunum.

Hóast útgangsstøðan eftir fyrru hálvfinaluna var 1-0 til Víking, so løgdu gestirnir heilt verjukent fyri. Tá ið so Hans Jørgen Djurhuus eftir framlegging og ikki so sannførandi málverjuspæl við høvdinum legði Víking framum, áðrenn 1. hálvleikur var hálvrunnin, so var spælið spilt hjá ÍF, sum ikki hevði verið fyri ongum inntil tá, men ongantíð fótaði sær eftir fyrsta málið.

Stutt fyri steðgin varð staðfest, at 2. hálvleikur bara fór at snúgva seg um, hvussu trivaligur samantaldi sigurin hjá Víkingi fór at verða. Rangstøðufellan hjá ÌF miseydnaðist, og Finnur Justinussen, sum so at siga ikki er farin av vøllinum seinastu vikurnar, uttan at hann hevur skorað, sendi bóltin framtið Andras Gango.

Eina stóra viku undan landsdystinum ímóti Serbia vísti Súni Olsen, at hann er um at finna rætta stevið. Eftir einum tíma krýndi hann gott avrik við at økja um leiðsluna við góðum skoti.

Víkingur framdi fleiri skiftingar fyri at spara lyklaspælarar, og tað var ein av innskiftarunum, Magnus Skoralíð, sum økti um munin til 4-0, tá ið hann eftir innlegg úr høgru frá Finni Justinussen, trillaði bóltin í málið. Finnur átti eisini uppleggið, tá ið miðvallarin Sølvi Vatnhamar setti síðsta seymin í.

### EB/Streymur – AB 4-1 (1-0)

**1-0:** Bárður Olsen 2.
**1-1:** Rasmus Nielsen 61.
**2-1:** Brian Olsen 63.
**3-1:** Arnbjørn Hansen 74.
**4-1:** Sorin Anghel 88.
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig –Bárður Olsen, Egil á Bø, Marni Djurhuus, Alex José dos Santos –Levi Hanssen, Brian Olsen (Gudmundur Nielsen, 78.), Sorin Anghel, Pauli G. Hansen, Hans Pauli Samuelsen – Arnbjørn Hansen (Gert Hansen, 89.)
**Gult kort:** Brian Olsen
**AB:** Tórður Thomsen – Tummas Justinussen, Rói Danielsen, Tehe Aristide, Alex Mellemgaard – Jobin Drangastein (Dánial Rói Olsen, 60.), John Hansen, Evrard Ble (Thomas Hans Rubbeksen, 78.), Kenneth Jacobsen, Rasmus Nielsen – Nikolaj Eriksen
**Gult kort:** Tehe Aristide

### FAKTA um dystin

**Víkingur-ÍF 5-0 (2-0)**
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**1-0:** Hans Jørgen Djurhuus 24.
**2-0:** Finnur Justinussen 44.
**3-0:** Súni Olsen 59.
**4-0:** Magnus Skoralíð 76.
**5-0:** Sølvi Vatnhamar 80.
**Víkingur:** Geza Turi - Sverri Jacobsen, Atli Gregersen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen - Andreas Lava Olsen (Símun Louis Jacobsen, 68.), Sam Jacobsen (Hjartvard Hansen, 73.), Súni Olsen, Sølvi Vatnhamar, Hans Jørgen Djurhuus (Magnus Skoralíð, 73.) - Finnur Justinussen
**Gult kort:** eingin
ÍF. Andras Gango - Áki Petersen, Poul Ennigarð, Viggo Johannesen, Fritleif í Lambanum (Jan Ellingsgaard, 47.) - Dánjal á Lakjuni (Alexander Jovevic, 56.), Frank Poulsen, Høgni Zachariasen, Nenad Saric (Hilmar Petersen, 70.), Balacs Sinko - Andy Olsen
**Gult kort:** eingin
Samantalt 6-1 til Víking, sum harvið hevur tryggjað sær pláss í finaluni